LM-087/2022

Fylgiskjal 2

Felagið fyri Kirkjuráðslimir

Til Almanna og Mentamálaráðið
Att: Siri Stenberg, landstýriskvinna

á Grækarismessu 2023

Felagið fyri Kirkjuráðslimir tekur undir við, at uppgávurnar hjá dómprósti verða býttar til tveir próstar; ein dómprást og ein prást.
Nevndin í Felagnum fyri Kirkjuráðslimir hevur tað greiðu meining, at allir kirkjuráðslimir í Føroyum skulu í komandi tíðum, verða við til at velja dómprást.
Próstur kann verða settur av biskupi.
Uppskotið til lógarbroyting kann skiljast sum, at tveir próstar verða settir og biskupur ger av hvør teirra røkir hvørjar uppgávur.
Vit meta tað verða greiðari, at umsøkjarnir vita, hvat av størvunum teir søkja.
Tá tú søkir dómpróstaembætið, veitst tú hvørjar uppgávur/øki, tú fært at røkja, og vit ynskja at dómpróstur ferðast um landið og hevur gudstænastur í øllum kirkjum nakrar ferðir um árið, og kemur sostatt út til øll kirkjuliðini við ávísum millumbili.
Søkir tú próstaembætið eru tað hinvegin tær uppgávurnar, tú røkir og ert knýtt/ur at ávísari kirkju.

Felagið fyri Kirkjuráðslimir tekur undir við,
At uppskot til
Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum
verður orðað soleiðis, at broytingar kunnu gerast, um biskupur og kirkjuligi mynduleikin metir tað verða neyðugt, uttan at nýggj lógarbroyting skal til.

Blíðar heilsanir,

vegna
Felagið fyri kirkjuráðslimir

Dagbjørt Ó. Hansen, forkv.
tpost: doh@email.fo
+298 211076

Katrin Højsted, skrivari
tpost: ffk@kirkja.fo
tlf. 584538